VI‹MERKINGAR

Hamarin á Argjum

Sakaris Hansen
valevni hjá
Javnarflokkinum



Hví fara vit á val, ta› er stutt og greitt, at velja eitt valevni, sum vil útrætta eitt ella anna› fyri borgarnar, sum búgva í T.K.

Fer man til gongu ígjøgnum b‡in, má man siga at hetta er ein vakur b‡ur í allar mátar, her manglar so at siga onki, ta› eiga vit sum búgva her at vera ógvuliga fegin um, men so kemur hatta menni og ta› er útja›arin, og her má man siga, her haltar, tíverri, hetta er ikki bara grenj, man eigur ikki at grenja bara fyri at grenja, men rætt skal vera rætt, ta› vísir seg solei›is, at kemur eitt lesarabræv í blø›ini, so hendur okkurt hissini, men ikki ta› heilt stóra, ta› ver›ur skava eit sindur her og der, eit lítursindur av asfalti› har sum ringast stendur til, so heldur man at nú skuldi veri í lagi, so nú er fri›ur eina tí› heldur man, hetta ber ikki til, hetta er órættvíst, eg haldi at tey sum búgva í útja›aranum í T.K skullu hava somu rættindi sum onnur sum búgva nærri b‡num, ta› má ikki vera nakar ivi um ta›,vit bí›a til ta› næsta lesarabrævi› kemur, so er fri›urin úti, puha aftur at starta maskinunar. Mær kemur fyri at her manglar naka›, hví, ja ta› veit eg ikki, kanska er ta› økonomiur, ella b‡rá›sliminir gloyma hendan partin av T.K, eg veit ikki, vónandi finst kanska ein forkláring upp á hetta.

Eitt líti› dømi er, at ein borgari uppi á Hamri á Argjum, setti eitt lesarabræv í blø›ini, um vegin sum gongur frá Albertshall og ni›an á hamarin, ta› var beinavegin at vegurin bleiv asfaltera›ur. Hetta er bara eitt dømi, ta› eru ivalest fleiri onnur dømir, ta› er neyvan nakar ivi um ta›. Sum ma›urin seg›i, ta› skulu a›rir bollar í suppuna, ta› má man siga, tí vóni eg at tey valevni sum skulu manna ta› n‡ggja b‡rá›i mugu› alt í ver›ini

Ikki gloyma hendan partin av T.K,

Fær borgarin nokk fyri skattapeningin?

Daisy Sloan,
valvni hjá Fólkaflokkinum

Hetta er trupult at siga, eg kenni ikki svari›, men øll hava síni serligu ynski í mun til sín persónliga tørv. Og í eini stø›u, har politikarar skulu b‡ta eina »skattakøku« solei›is, at allir bólkar í kommununi fáa sín rímiliga part, ver›ur úrsliti›, at fleiri øki, kanska øll, liggja í hálvum gekki, borgarin fær eina hálva loysn. Ra›festingin manglar ella er tá skeiv, og ø›rvísi ra›festing er kanska mátin, tí veruleiki er at:

– ta› eru rættiliga nógvar familjur, stakir uppihaldarar, ung, eldri og rørslutarna›, sum ongan bústa› hava.

– pensjonistar og onnur hava onki alternativ, skuldu tey ynskt ein minni og/ella ód‡rari búst a›

– ta› eru nógv børn, sum onki ansingarpláss hava í dagrøkt ella dagstovni

– øll børn eiga, men hava ikki sama rætt til forskúla og frítí›arskúla

– skúlarnir eru ov smáir

– ongin skúlalækni er í Tórshavnar kommunu

– ikki allir n‡fø›ingar í kommununi fáa vitjan av heilsusystir

– bí›ilistin í Tórshavnar Musikkskúla er langur

– vegirnir treingja nógva sta›ni til ábøtur

– ta› treingir til at frí›kast um nógva sta›ni í b‡num

og eg kundi hildi› fram.

Fólkaflokkurin ætlar at gera naka› vi› hetta, og vi› atliti til, at skattatr‡sti› ikki økist.

Langtí›arætlan tryggja bestu vi›urskifti á skúlaøkinum

Tórfinn Smith
b‡rá›slimur og valevni

Útbyggja vit ikki okkara skúlaverk eftir eini væl umhugsa›ari langtí›arætlan, enda vit í tilvildarligum kloddaloysnum

Ta› kann ikki vera rætt, at hvør skúlaársbyrjan loypir hvøkk á kommunalu myndugleikarnar í Havn. Tá s‡nist sum panikkur kemur í. Er nú pláss fyri allar næmingarnar? Hvør skúli skal h‡sa hvørjum? Skulu vit ikki bara byggja eitt sindur upp í onkra barakk? Ella keypa onkur sethús í grannalagnum, sum ver›a bo›in b‡rá›num til sølu? So er problemi› loyst fyri í ár!? Hetta er ein arbei›sháttur, men neyvan hin rætti.

Ta› forpliktar, at tri›ji hvør næmingur í føroyska fólkaskúlanum gongur í skúla í Havn. Sí›ani skúlaári› 1997/98 til í ár er næmingatali› økt vi› 385. Hetta setur sjálvandi stór krøv til karmin - skúlabygningarnar, sum er kommununar partur at nøkta. Burtursæ› frá knappligari og óvanligari tilflyting er ikki so torført at gera framrokningar í sambandi vi› tørv á skúlabygningum. Børnini ver›a hóast alt fødd sjey ár á›renn tey vanliga fara í skúla.

Skulu vit, og ta› er í hvussu er mín hugsan, geva okkara skúlaungdómi best møguligar umstø›ur, stytstu og tryggastu lei› í skúla, og best møguliga skúlaumhvørvi, er einasta lei›, at analysera verandi tørv og harnæst at planleggja vi› teimum framrokningum og ambo›um annars, sum eru til taks. Og fyri at hetta ikki bert skulu vera or›, skal sjálvandi ney›ug upphædd setast á fíggjarætlanina á hvørjum ári.

Ein tílíkur arbei›sháttur er betri og bíligari enn tilvildarligar kloddaloysnir, sum vi›hvørt stinga seg upp, og harafturat, so vita børn, foreldur og øll onnur, hvat teimum stendur í bo›a tey næstu árini.

Ein tílík langtí›arætlan er sjálvsagt tengd at n‡ggjum útstykkingarætlanum, har barnaansingarstovnur, frítí›arskúli, fólkaskúli, trivna›armøguleikar og alt anna› eru natúrligir partar av.

Nakrir spurningar til Jóannes Eidesgaard

Hjørdis Heindriksdóttir

Høvdu tygum kunna› gjørt so væl at svara mær hesum spurningum? Hetta eru spurningar, sum eg sakni at tí›indafólk spyrja nærri um. Vinarligast grundi› hvønn spurning sær.

1. Vóru tygum til sta›ar, tá i› danska fólkatingi› samtykti sáttmálan um minnilutamál, eftir at stjórnin hev›i nokta› at vi›urkenna føroyska máli› sum tjó›armál og høvu›smál í Føroyum?

2. Um ja, hvat avkvøddu tygum?

3. Tygum føra ofta fram í ymsum høpi, at landsst‡ri› setur fólkaræ›i› til viks í sambandi vi› fullveldismáli›. Hvussu ger ta› ta›?

4. Somulei›is tosa tygum ofta um ósannindi, sum landsst‡ri› førir fram. Hvørji eru hesi ósannindi?

5. Hví skal landsst‡ri› ikki bi›ja um uppl‡singar í sambandi vi› fullveldismáli›, tá i› danska stjórnin sjálv hevur bi›i› ta›, gera ta›?

6. Er ta› rætt av donskum rá›harrum at nokta føroyingum at venda sær til ST og at tosa vi› NATO-umbo›?

7. Um ja, hvussu átti at veri› fari› fram? Landsst‡ri› royndi tveir mátar – hin fyrsta vi› at venda sær beinlei›is til ST og hin næsta vi› at heita á uttanríkismálará›harran um at virka fyri at fundur fekst vi› NATO-umbo›. Bá›ir mátarnir vóru eftir tygara meting skeivir og uttan fyri okkara heimildir, tí vit enn eru undir heimast‡rislógini. Hvør er tá hin rætti?

Vi› vón um skjótt svar
20. oktober 2000

Lægri Skatt

Johan Mortensen
Valevni hjá
Tjó›veldisflokkinum

Sunda Kommuna hevur læ›ka› sítt skattaprocent. Í Írlandi er persónligi skatturin umlei› 12 %. Vit mugu so avgjørt læ›ka skattaprocenti› bæ›i í Havn og í Landsskattinum. Tann persónligi skatturin er alt, alt ov høgur. Vi› skatti, oljuavgjaldi, MVG, Als og ø›rum avgjøldum eru vit fastlæst í einari fíggjarliga spennitroyggju sum darvar frambur›shuginum.

Ta› er ein sannroynd at lægri skattur gevur størri nøgdsemi, økt vinnulív og tá samanum kemur fær bæ›i borgarin og landsskassin meira burturúr.

Vit fáa bert sannan trivna› vi› lægri skatti. Ta› er ein skandinaviskur tvangstanki at bert høgur skattur gevur vælfer›.

Tvørturímóti byggur tú land vi› einum lágum skatti, ta› eru Isle of Man og risastóri vinnulívsvøksturin í Írlandi kanska bestu dømir um.

Lægri skattur er ein átro›kandi uppgáva hjá komandi B‡rá›i› sum eg vil stu›a fult og heilt.



Tørvurin á barnaskúlum skal nøktast!

He›in Mortensen
b‡rá›slimur, sambandsvalevni til Tórshavnar b‡rá›
www.hemorten.com

Í kjalarvørrinum á barnaansingartrupulleikanum kemur altí› skúlatrupulleikin, i› má ver›a loystur, á›renn børnini koma í skúlaaldur.

Hesum hevur Tórshavnar b‡rá› tiki› hædd fyri, og framvegis skal ver›a arbeitt fyri at hava skúlaøki› fullkomuliga dagført í høvu›ssta›num.

Stø›an er í dag tann, at tørvurin bara akkurát ver›ur nøkta›ur, so her er ney›ugt at binda um heilan fingur, tá vit hugsa frameftir.

Stig eru tikin til at betra stø›una, tí nevnast kann, at øki› til skúlabygging longu er lagt av vi› Landavegin, so farast kann undir bygging av n‡ggjum skúla har í næstum, eins og ítøkiligar ætlanir eru um nærskúla í Hoyvík.

Serliga henda seinna ætlanin er spennandi, tí her ver›ur talan um eina uppíbygging av Hoyvíkar skúla, i› kortini ver›ur skipa› solei›is, at sjálvur skúlabygningurin ver›ur í nánd av teimum børnum, i› skulu brúka hann.

Hetta er bara tann fyrsta royndin av hesum slagnum, i› ætlandi skal liggja sum grund undir fleiri líknandi nærskúlum, har tørvur er á hesum.

Vi› teimum útbyggingum, vit síggja og hava sæ› í høvu›ssta›arøkinum, er náttúrligt, at fleiri av verandi skúlum ver›a útbygdir á henda hátt, so øll skúlabørn skulu fáa sína barnaskúlagongd í sjálvum nærumhvørvinum.

Stóra tilflytingin til Tórshavnar kommunu treytar, at fylgt ver›ur væl vi› á hesum øki, tí samstundis sum skúlabarnatali› alsamt økist, skal skúlin fyrireikast til at nøkta tørvin.

Tá er ikki minst ney›ugt, at ney›ugu karmarnir bókstaviliga eru til ta›, so tí ver›ur arbeitt fyri, at nærskúlar gerast ein haldgó› og vælvirkandi loysn hesi mongu næstu árini!

Innbjóðing

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

Skotarók 14 - 100 Tórshavn - Tlf. 320204 - Fax 320206 - kvasir@farodane.fo

Mánadagin 13. nov.:

Opið hús á Kvasir

Farodane er av tí áskoðan, at umhvørvið skal vera í lagi, um skeiðluttakarin skal fáa sum mest burturúr. Við hesum í huga hava vit útvegað okkum ognina Skotarók 14, ið best man vera kend sum húsini hjá Kára Müller undir Oyggjarvegnum. Hølini eru innrættaði við nýggjastu og mest framkomnu útgerðini, soleiðis at allar teknisku fyritreytirnar fyri munadyggum skeiðvirksemi eru til staðar.

Vit bjóða tær við hesum til opið hús á KVASIR har høvi verður at kunna seg við útgerð, hølir o.a. Tiltakið tekur uml. 45 min. og sjálvandi bjóða vit okkurt leskandi eisini.

FARODANE 10-00

Jú, takk, vit koma!

Kl. 09.00 - 10.00 ________ pers
Kl. 10.00 - 11.00 ________ pers.
Kl. 11.00 - 12.00 ________ pers.
Kl. 13.00 - 14.00 ________ pers.
Kl. 14.00 - 15.00 ________ pers.
Kl. 15.00 - 16.00 ________ pers..

Navn/virki/stovnur ______________________
Búst.______________________
Bygd/býur ______________________
Tlf.: ____________ Teldupost: ______________

KVASIR - Skotarók 14 - FO 100 Tórshavn - Tlf. 320204 - Fax 320206 - kvasir@farodane.fo

JÓLASEYMING
(20tímar)

Í viku 45 og/ella 46 (týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 17.00) verður seymað uppi á loftinum í Piddasa handli. Ætlanin er at geva góð hugskot og mynstur til ymiskt jólaligt t.d smáting til jólagávur, jólaprýði, jólakalendarar, jólatræsteppi o.s.fr.

Kostnaður kr. 200,- (grundgjald)
+ 2 kr. um tíman= kr. 240,-

Tilmelding hjá Odvør tel. 444440

FUGLAFJARÐAR KVØLDSKÚLI og
FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

STOVU TEPPIR

* 4 mtr. breið
* Prísir kr. 399,- mtr.
* ÓKEYPIS álagt

máling & gólv

Við Landavegin
Tórshavn • Tel. 31 60 66

Toll- og Skattstova Føroya,
St‡ri ›

Fulltrúi í kolvetnisskattafyrisiting

Søkt ver›ur eftir einum fulltrúa til kolvetnisskattafyrisitingina í St‡rinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Argjum. Starvi› ver›ur at byrja vi› skipa› undir Eftirlitsdeildini í St‡rinum, men kann seinni ver›a flutt til eina sjálvstø›uga Kolvetnisskattadeild í St‡rinum.

Høvu›suppgávur hjá fulltrúanum ver›a saman vi› einum løgfrø›ingi frá lógardeildini eitt nú

- at fyrireika álíkningina av komandi inntøkum frá kolvetnisvinnuni
- at fyrireika ney›ug skjøl v.m. til roknskaparálíkningina
- at leggja til rættis kunnger›ir, rundskriv og allar veglei›andi ásetingar vi›víkjandi roknskaparálíkningini
- at kanna og taka stø›u í ivamálum
- at kunna kolvetnisvinnuna um kunnger›ir, rundskriv og allar veglei›andi roknskaparreglur álíkningini vi›víkjandi
- at skipa fyri útbúgving av starvsfólki saman vi› løgfrø›ingi og útlendskum hjálparum, tá tí›in ver›ur mett at vera búgvin til at seta slíka útbúgving í gongd
- at skipa fyri at fáa serfrø›ingar í kolvetnisskatting til Føroya at undirvísa

Førleiki: Umsøkjarar skulu hava roknskaparliga útbúgving frá hægri lærustovni (lærdum háskúla). Kunna málbera seg á enskum bæ›i í talu og skrift, og kunna arbei›a bæ›i sjálvstø›ugt og saman vi› ø›rum.

Vit bjó›a

- eitt spennandi starv vi› avbjó›ingum, fakligum eins væl og persónliga
- flextí›
- sjálvstø›ugt starv í gó›um arbei›sumhvørvi
- eftirútbúgving í kolvetnisskattafyrisiting hjá norskum og donskum kolvetnisskattamyndugleikum møguliga ø›rum eisini
- møguleika fyri seinni – alt treyta› av gongdini í kolvetnisvinnuni – at fáa eitt lei›andi starv í einari sjálvstø›ugari kolvetnisskattadeild undir St‡rinum

Væntast kann, at starvi› í byrjanini kemur at hava vi› sær uppihald í styttri og longri tí›arskei› uttanlands í útbúgvingarørindum.

Setanartreytir: Starvi› ver›ur sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri› og avvar›andi fakfelag.
Kravt ver›ur, at tann, i› settur ver›ur, luttekur í útbúgving í styttri og longri tí›arskei› bæ›i uttanlands og í Føroyum, og eftir slíka útbúgving skipar fyri útbúgving av starvsfólki til kolvetnisskattingina. Lønin kann seinni ver›a hækka› í mun til førleika og starvsheiti.

Setanarøki› fevnir um a›alst‡rini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, i› settur ver›ur, skal kunna røkja tænastu á hesum stø›um, um ta› ver›ur kravt.

Nærri frágrei›ing um starvi› fæst vi› at venda sær til St‡ri›, Beintu Festirstein ella Óla Heinesen, tlf. 352026.

Umsóknir: Umsóknir vi› avriti av prógvi og uppl‡singum um vi›komandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 23. novemb-er 2000.

Toll- og Skattstova Føroya
St‡ri ›
Postboks 2151
FO-165 Argir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur hjá landinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna herundir eisini kolvetnisskattalóggávuna. Stovnurin hevur 148 starvsfólk og er skipa›ur solei›is, at planlegging og menning fer fram í St‡rinum, sum heldur til á Argjum. Tær 6 økisskrivstovurnar, sum eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin.

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC

Heimasí›a okkara:
www.sosialurin.fo